UTTAN ÚR HEIMI

## Koyra ST av landinum

Myndugleikarnir í Usbekistan hava givið ST-umboðsmanninum í flóttafólkamálum boð um at fara av landinum.

Í boðunum stendur, at umboðsmaðurin skal fara úr Usbekistan innan ein mánað. Usbekiska stjórnin vil vera við, at ST verjir brotsmenn og yvirgangsmenn, tí felagsskapurin hjálpir fólki, sum rýmdu úr Usbekistan til grannalandið Kirgisistan aftan á eina miseydnaða kvettroynd í býnum Andijan í mai í fjør.

ST-umboðsmaðurin sigur, at hann harmast avgerðina hjá usbekisku stjórnini, men at hann fer at gera eftir boðunum. ST fer kortini ikki at sleppa flóttafólkunum upp á fjall, men fer at útvega teimum hjálp á annan hátt enn higartil, sigur umboðsmaðurin við AP-tíðindastovuna.

## Noyddist frá

Svøríki hevur fingið nýggjan uttanríkisráðharra. Í morgun kunngjørdi Göran Persson, forsætisráðharri, at Laila Freiwalds hevði gjørt av at leggja frá sær, og at Bosse Ringholm tekur við eftir hana. Hann var varaforsætisráðharri.

Laila Freiwalds var fyri hvøssum atfinningum aftan á flóðalduvanlukkuna í Suðurasia, tí flestu sviar vildu vera við, at uttanríkisráðið hevði handfarið vanlukkuna stak illa. Herfyri kom hon aftur í eldin orsakað av tekningunum av Muhammed profeti, so nú fleyt bikarið yvir.

Sjálv sigur Laila Freiwalds, at fjølmiðlarnir hava gjørt meiri burtur úr hennara persóni heldur enn teimum veruligu viðurskiftunum.

## Arabarar eftir norskari olju

Norska oljufelagið Statoil vil fegið sleppa fram at oljuríkidøminum í Algeria, men nú hevur tað almenna algeriska oljufelagið svarað, at so vil tað sleppa á norska landgrunnin afturfyri.

Algeriska oljufelagið hevur ongar royndir við at leita eftir olju á sjónum, tí higartil hevur felagið bara arbeitt í algerisku oyðimørkini. Men stjórin í felagnum, Mohamed Maziane, sigur við Aftenposten, at tað er eingin trupulleiki. Tvørturímóti væntar hann sær nógv burtur úr samstarvinum við Statoil, sum serliga er ætlað at umfata gass.

Norska felagið hevur fleiri leitingarloyvi í Algeria, og felagið er sinnað at lata algeriska felagið fáa lut í virksemi sínum á norska landgrunninum, men sambært Aftenposten ætlar algeriska felagið at fáa egin loyvi í norskum sjógvi.

## Seldu myndir av naknum fólki

Amerikanski myndamaðurin Spencer Tunick er kendur fyri myndirnar, sum hann tekur av naknum fólki kring allan heimin. Seinasta summar var hann í Newcastle í Onglandi, har umleið 1700 fólk lótui seg úr hvørjum klodda, so hann kundi taka myndir av teimum.

Nú vísir tað seg, at tað var ikki bara Spencer Tunick, sum tók myndir av teimum naknu Newcastle-búgvunum. Sambært Reuter høvdu nakrir løgreglumenn valt at taka myndatólið við sær, og stutt eftir kundu fólk í Newcastle keypa nærmyndir av naknum fólki á vertshúsum og aðrastaðni í býnum.

Illgruni er um, at tað vóru løgreglumenninir, sum tóku myndirnar, og at teir eisini royndu at selja tær. Løgreglan í Northumbria váttaði í gjár, at tveir løgreglumenn hava fingið boð um, at teir skulu ikki koma til arbeiðis fyribils, meðan málið verður kannað. Næstovastin hjá løgregluni, David Warcup, sigur við Reuter, at eru løgreglumenninir sekir, er málið sera álvarssamt, tí tílíkur atburður verður als ikki góðkendur, sigur hann.

# Býurin er sum bumbaður



*Larry gjørdi skaða fyri minst hálva aðru milliard krónur*

**Meldurródnin Larry, sum herjaði landnyrðingspartin av Avstralia, gjørdi stóran skaða. Nú er enn ein ódn á veg ímóti landi**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey, sum búgva í avstralska landspartinum Queensland, vilja vera við, at „Larry" var tann riongasta meldurródnin í meiri enn hundrað ár. Sethús, skúlar og aðrir bygningar vórðu javnaðir við jørðina, gomul trø vórðu rykt upp við rót, og í gjár sótu 50.000 fólk framvegis í streymloysi.

– Býurin er sum bumbaður, segði borgarstjórin í býnum Cairns við fjølmiðlarnar, og sambært blaðnum The Australian hevur „Larry" gjørt skaða fyri minst hálva aðru milliard krónur.

Tað kann gerast verri enn, tí í gjár boðaðu avstralsku veðurmenninir frá, at ein onnur meldurródn er á veg ímóti landi, og at hon helst eisini fer at raka Queensland. Ódnin, sum hevur fingið navnið „Wati", var í gjár 800 fjórðingar eystan fyri avstralsku strondina og gekk vestureftir. Hon er ikki so ring sum „Larry", men veðurmenninir siga, at hon fer at versna, so hvørt sum hon nærkast landi.

# Eitt øvugt neyðtøkumál

**Tey flestu væntaðu, at ein ákæra um neyðtøku fór at kosta fyrrverandi suðurafrikanska varaforsetanum tað politiska lívið, men ístaðin fyri hava fólk vent sær ímóti kvinnuni**

NEYÐTØKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var líkt til, at teir politisku dagarnir hjá Jacob Zuma vóru taldir, tá ein 31 ára gomul kvinna skuldsetti hann fyri at hava neyðtikið seg. Men nú málið hevur verið í rættinum, hava hansara viðhaldsfólk snarað tí ímóti kvinnmuni, og sjálvur hevur fyrrverandi varaforsetin gjørt sítt til at sláa málið upp í glens, eins og verjar hansara hava tosað niðrandi um kvinnuna. Zuma viðgongur, at hann hevði samlegu við kvinnuni, men avsannar, at hann neyðtók hana.

Tað vakti ans, tá Jacob Zuma dansaði saman við sínum viðhaldsfólkum uttan fyri rættarhølið, júst sum hann hevði verið til avhoyringar. Kvinnan mátti harafturímóti fáa verju frá løgregluni, meðan viðhaldsfólkini hjá Jacob Zuma bóðu løgregluna „brenna horuna". Sambært fjølmiðlunum hevur kvinnan fingið fýra drápshóttanir.

Hetta hevur fingið suðurafrikanskar kvinnufelagsskapir at gera vart við seg.

– Atburðurin hjá Jacob Zuma vísir, at hatur til kvinnuna er framvegis vanligt í okkara løgfrøðiligu skipan, skrivaði eitt av bløðunum um vikuskiftið, og sakførarin Lisel Gerntholz segði við eitt annað blað, at framferðin hjá fyrrverandi varaforsetanum fer at elva til fleiri neyðtøkur í Suðurafrika.

– Sjálv hevði eg ikki torað at boða frá neyðtøku aftan á tað, sum er hent í hesum málinum, sigur Lisel Gernholz, sum starvast hjá einum felagsskapi, sum arbeiðir við neyðtøkum og AIDS.

Framman undan hevur Suðurafrika næstan heimsmet, tá tað snýr seg um neyðtøkur. Sambært myndugleikunum vórðu 55.114 neyðtøkur skrásettar í tíðarskeiðinum frá apríl í 2004 til mai í fjør.